# Steinur omanav byrðu – skattaumlegging er neyðug

- sjónarmið Føroya Arbeiðsgevarafelags

## Samandráttur

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at tað er neyðugt at fremja umleggingar í føroysku skattaskipanini, og at rætta tíðin at gera hetta er nú. Í Føroyum liva vit ikki í einari ostaklokku, tvørturímóti. Starvsfólk og kapitalur kann flyta seg frítt tvørtur um landamørk, og vit mugu tí vera kappingarfør, um vit vilja eggja starvsfólki at velja at arbeiða í Føroyum, og fyri at fáa íleggjarar at gera íløgur og skapa arbeiðspláss í Føroyum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at málið fyri eina skattaumlegging eigur at vera:

***Ein kappingarfør skatta- og avgjaldsskipan, sum eggjar til íløgur, virksemi og arbeiði í Føroyum.***

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at týdningarmesta broytingin, sum politiska skipanin kann fremja, er at lækka lønarskattin, so hann verður meira kappingarførur við lønarskattin í grannalondunum. Av einari løn uppá 25.000 kr. um mánaðan eru í løtuni uml. 5.000 kr. meira eftir í lønarposanum hjá einum føroyingi, sum arbeiðir og rindar skatt í Noregi, í mun til føroyingin, sum arbeiðir og rindar skatt í Føroyum. Um lønin er hægri, verður munurin størri. Tað er tí ikki so løgið, at føroyingar í mun til lønarinntøku eru evropameistarar í altjóða pendling millum heim og arbeiði tvørtur um landamørk, og at talið á hesum pendlarum er vaksandi.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur tað vera púra skeivt, at tað í stóran mun er skattaskipanin, sum eggjar starvsfólki til at leita sær uttanlands at arbeiða, og harvið forða fyri øktum virksemi og fleiri arbeiðsplássum í Føroyum. Føroyskir arbeiðsgevarar skulu ikki bara kappast við útlendskar arbeiðsgevarar um at gjalda eina kappingarføra løn. Teir skulu eisini kappast við ein lægri lønarskatt í grannalondunum. Serliga í Noregi er lønarskatturin nógv lægri enn tann føroyski, og tá munurin er so stórur, verður sera torført at vinna kappingina.

Ítøkiliga mælir Føroya Arbeiðsgevarafelag til, at henda skattaumskipan verður framd:

- Eina líðandi lækking av persónliga inntøkuskattinum, so hann gerst meira kappingarførur, serliga í mun til norska lønarskattin. Málið fyri lækkingini eigur at vera, at allir skattgjaldarar í Føroyum gjalda sama lønarskatt sum sjómenninir.
- Ymiskir møguleikar eru at fíggja eina slíka lækking í lønarskattinum. Tað kann t.d. vera gjørt við at minka almenna útreiðsluvøksturin og/ella við brúkaragjaldi fyri ávísar almennar tænastur, sum í dag standa øllum, sum búgva her, ókeypis í boði. Slík brúkaragjøld kunnu antin verða eitt fast gjald ella tengd at inntøku.

Tað er tó ein fortreyt fyri at kunnu lækka inntøkuskattin, at tiltøk, sum betra um langtíðar haldførið hjá landskassanum, verða sett í verk. Búskaparráðið hevur víst á, at tað er neyðugt við einari varandi fíggjarpolitiskari herðing, sum svarar til uml. 5% av BTÚ (750 mió kr.) á fíggjarlógini. Tess longri vit bíða við at seta tiltøkini í verk, tess ógvusligari mugu tiltøkini vera. Verður einki gjørt, verður alsamt

størri trýst á teimum skattgjaldarum, sum eru eftir í Føroyum, og sum skulu fíggja tann vaksandi kostnaðin av aldurstengdu útreiðslunum á fíggjarlógini, so sum pensión og heilsutænastur.

Ein stórur partur av trupulleikanum við langtíðar haldførinum kann loysast, um vit:

- Dagføra pensiónsaldurin til veruleikan í dag. Pensiónsaldurin má taka hædd fyri tí veruleika, at vit liva alsamt longri, og at vit sum eldri eru betri fyri enn fyrr.
- Broyta reglurnar um mótrokning í pensiónunum, so tað verður mótroknað í allari almennu pensiónini, men við einum lægri mótrokningarprosenti. Í dag eru tað í stóran mun mótrokningarreglurnar, sum eru orsøk til, at fólk gevast á arbeiðsmarknaðinum, hóast tey annars høvdu verið før fyri at hildið á at arbeitt. Hetta eigur at verða broytt.
- Seta í verk tiltøk, sum kunnu økja um fólkavøksturin í Føroyum. Ein heildarætlan við ítøkiligum tiltøkum er gjørd, so tað er í stóran mun ein spurningur um vilja at fremja tiltøkini.

## 1. Størstu trupulleikarnir í verandi skattaskipan

Í einum globaliseraðum heimi, har íløgur og arbeiðsmegi lættliga flyta seg um landamørk, hevur tað alstóran týdning, hvussu skattaskipanin í einum landi er skrúvað saman. Tað ber snøgt sagt ikki til bert at taka atlit til innlendis viðurskifti, tá skattaskipanin verður viðgjørd. Viðurskiftini í øðrum londum, serliga grannalondunum, hava eins stóran týdning. Í fleiri av okkara grannalondum hava myndugleikarnir ásannað hetta og sett í verk skattaumskipanir, sum hava lækkað skattatrýstið og umlagt skattirnar, so londini gerast meira kappingarfør um starvsfólk og íløgur.

OECD hevur í fleiri frágreiðingum ávarað móti í fyrsta lagi einum ov høgum partafelagsskatti, og í øðrum føri einum ov høgum lønarskatti, eftirsum felagsskapurin metir, at hetta eru teir mest skaðiligi skattirnir fyri vøkstur og vælferð í einum landi[1].

Av tí at partafelagsskatturin í Føroyum í løtuni er kappingarførur í mun til støðið í grannalondunum, heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag tað tó vera rætt at loysa trupulleikarnar við lønarskattinum í fyrsta umfari. Tí tað er serliga høgi føroyski beinleiðis lønarskatturin, sum er trupulleikin í dag. Tann høgi beinleiðis lønarskatturin hevur fleiri neiligar avleiðingar fyri føroyska arbeiðsmarknaðin og samfelagið annars:

- *Torført at fáa mannað størv í Føroyum*

Skattaskipanin eggjar starvsfólki til at leita til onnur lond, serliga Noregs, heldur enn at arbeiða í Føroyum. Hetta er ein serliga stórur trupulleiki innan handverksøkið, men eisini onnur framleiðsluvirki hava mist og missa framvegis teknisk starvsfólk. Um vit ikki eru kappingarfør um at fáa røttu starvsfólkini, missa vit framleiðsluførið, og skattainntøkurnar enda í stóran mun í útlandinum. Harumframt førir vantandi útboðið av arbeiðsmegi til lønarglíðing, sum serliga er ein trupulleiki fyri kappingarførið hjá teimum fyritøkum, sum selja sínar vørur á heimsmarknaðinum, og fyri føroyska brúkaran, sum skal gjalda meira fyri tænasturnar á heimamarknaðinum.

Talan er um eitt vaksandi tal av føroyingum, sum leita sær uttanlands, og tilsamans er tað uml. ein milliard lønarkrónur, sum verða goldnar úr útlandinum til Føroya. Ein stórur partur av hesum lønarkrónum verður ikki skattaðar í Føroyum. Í talvuni niðanfyri sæst gongin í lønarflytingum frá útlendskum arbeiðsgevarum til Føroya (bláa strikan) og frá føroyskum arbeiðsgevarum til útlandið (reyða strikan). Grøni stabbin er munurin millum inntøkurnar og útreiðslurnar.



- *Minni hugur at arbeiða og útbúgva seg*

Tá beinleiðis lønarskatturin er so høgur, sum hann er í Føroyum, kann tað hava neiliga ávirkan á hugin at taka eitt eyka tak, tá nógv er at gera. Umleggingin til ein flatari skattastiga hevur bøtt nakað um henda trupulleikan. Um lønarskatturin er ov høgur, og stórur partur av hægri lønini skal gjaldast í skatti, eggjar hann ikki í líka stóran mun fólki til at útbúgva seg við at fara í læru ella at fara undir lesnað.

- *Vit gera ikki tað, vit duga best*

Um lønarskatturin er ov høgur, gera vit ikki tað, vit duga best. T.d. kann skattaskipanin gera, at tað kann loysa seg hjá bakaranum at arbeiða minni, og so brúka frítíðina til at gera umbyggingar heima við hús, hóast ein timburmaður kundi gjørt tað bæði skjótari og betri. Á sama hátt kann tað loysa seg hjá timburmanninum at baka breyð heima við hús, hóast bakarin kundi gjørt hetta bæði skjótari og betri á sínum bakaríi.

Orsøkin er, at virðið á mistu arbeiðstíðini verður roknað eftir skatt. Tað skal so samanberast við eina rokning frá handverkaranum, sum eisini íroknar skattin, sum viðkomandi skal gjalda, umframt MVG. Rokningin hjá handverkaranum skal jú taka hædd fyri, at hann skal hava eina líkinda tímaløn eftir skatt og MVG. Føroyska samfelagið verður tó fátækari, tá vit hvør í sínum lagi ikki gera tað, vit duga best.

- *Størri trýst á lønarskattin, tá vaksandi partur av lønunum verða skattaðar uttanlands*

Ein alsamt størri partur av løntakarum við bústaði í Føroyum rindar lønarskatt uttanlands, hóast løntakararnir og familjur teirra brúka tær almennu tænasturnar í Føroyum. Omanfyri eina milliard lønarkrónur verða upptjentar av løntakarum, sum búgva í Føroyum og arbeiða uttanlands, og stórur partur av hesum lønum verða ikki skattaðar í Føroyum. Hesir persónar og familjur teirra nýta tó framvegis almennu tænasturnar, sum tey, sum gjalda skatt í Føroyum, fíggja. At arbeiða fyri útlendskan arbeiðsgevara er eitt val, sum hvør einstakur ger, men sum er, eggjar føroyska skattaskipanin hesum fólkum til at arbeiða og gjalda skatt uttanfyri landoddarnar. At ein lutfalsliga stórur og vaksandi partur av samlaðu lønarinntøkunum ikki verða skattaðar í Føroyum, er viðvirkandi til at leggja eitt eyka trýst á skattin hjá teimum løntakarunum, sum rinda lønarskatt í Føroyum.

Harumframt eru aðrir trupulleikar, sum ikki eru tengdir at arbeiðsmarknaðinum, eitt nú at kommunur, har nógvir uttanlandspendlarar búgva, ikki fáa tær skattainntøkur, sum eru neyðugar fyri at varðveita eitt høgt kommunalt tænastustøði.

Samanumtikið er rótin til omanfyri nevndu trupulleikar serliga, at føroyski beinleiðis persónligi inntøkuskatturin er millum teir hægstu í heiminum. Hetta er við til at eggja fólki at arbeiða og í stóran mun gjalda skatt uttanlands, og harvið smalkar føroyska skattagrundarlagið.

## 2. Føroyski lønarskatturin samanborin við grannalondini

Sum nevnt eru Føroyar í støðugari kapping, serliga við grannalondini, um at draga starvsfólk til sín. Skattaskipanin ávirkar eisini hesa kappingina.

Tá tað snýr seg um avgerðina um at *arbeiða í Føroyum ella uttanlands*, er tað serliga beinleiðis lønarskatturin (íróknað arbeiðsmarknaðargjøld), sum ávirkar avgerðina, hvørt tey velja at arbeiða í Føroyum ella at arbeiða uttanlands[2].

Og tá tað kemur til beinleiðis lønarskatt, er føroyski lønarskatturin ov høgur í mun til grannalondini, eisini hægri enn í Danmark[3]. Hóast ein flatari skattastigi fyri lønarskatt varð settur í verk í Føroyum fyri fáum árum síðani, vístu útrokningar hjá Fíggjarmálaráðnum, at beinleiðis lønarskatturin framvegis var høgur og fyri flestu inntøkubólkar eisini hægri enn í Danmark, sum annars hevur ein av heimsins hægstu lønarskattum.

Ein føroyingur, sum arbeiðir á landi í Noregi, skal sambært tvískattaavtaluni rinda skatt í Noregi av norsku arbeiðsinntøkuni. Sum útgangsstøði skal hann eisini rinda norsk arbeiðsmarknaðargjøld, men hann kann søkja um at sleppa undan, um hann í staðin rindar tey lægru føroysku arbeiðsmarknaðargjøldini. Útrokningar hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag hava víst, at føroyingur, sum arbeiddi á landi í Noregi í 2013 og rindaði skatt har, hevði munandi meira eftir í lønarposanum, enn um hann arbeiddi og rindaði skatt í Føroyum. Um mánaðarlønin t.d. var millum 25.000 og 33.000 kr., hevði føroyingurin sum arbeiddi í Noregi 5-6.000 kr. meira eftir um mánaðin, aftaná at skattur og sosial avgjøld eru goldin. Sí trý inntøkudømi í talvuni niðanfyri.

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Arbeiði í Noreg** | | | |
| Mánaðarløn | 25.000 | 29.167 | 33.333 |
| Skattur (NO) + sosial gjøld (FO)[i] | 4.796 | 6.265 | 7.534 |
| Netto eftir | 20.204 | 22.902 | 25.799 |
| | | | |
| **Arbeiði í Føroyum** | | | |
| Mánaðarløn | 25.000 | 29.167 | 33.333 |
| Skattur + sosial gjøld | 9.754 | 11.622 | 13.494 |
| Netto eftir | 15.246 | 17.545 | 19.839 |
| | | | |
| **Munur** | **4.958** | **5.357** | **5.960** |

Kelda: skattetaten.no og egnar útrokningar

[i] Roknað er í hesum dømunum við, at persónurin søkti um undantak fyri gjald til norska Folketrygd, og í staðin rindaði føroysk arbeiðsmarknaðargjøld. Um persónurin í staðin velur at rinda til norska Folketrygd, verður munurin nakað minni, men framvegis eru fleiri túsund krónur á muni. Tað skal gerast vart við, at dømini omanfyri eru grundaðar á miðalprosent, og taka ikki hædd fyri, at persónar, alt eftir umstøðunum, kunnu verða skattaðir ymiskt, bæði í Noregi og í Føroyum.

Umframt at skatturin er munandi lægri fyri føroyingar, sum arbeiða og rinda skatt í Noregi, er skatturin eisini lægri fyri føroyingar, sum arbeiða í Noregi, men sum verða skattaðir í Føroyum.

## Neyðugar broytingar

### 2.1. Lækka lønarskattin – sjómannafrádrátt til allar skattgjaldarar

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur tað vera neyðugt við einari umlegging av skattaskipanini, sum minkar lønarskattin. Umráðandi er tó, at kostnaðurin av hesari broytingini verður fíggjað á annan

hátt. Roknast kann ikki við, at ein slík broyting er sjálvfíggjandi, hóast hon sannlíkt førir til nakað av øktum virksemi og skattainntøkum. Tí er neyðugt at finna aðra fígging, antin við at tátta í á útreiðslusíðuni ella við at finna aðrar inntøkur.

Lækkingin eigur at vera so munagóð, at tað ikki, ella bert í minni mun, er skattaskipanin, sum eggjar fólki til at søkja sær arbeiði uttanlands. Eitt mál kundi verið at sett sær fyri, at lønarskatturin verður lækkaður við uml. 6 prosentstigum í mun til í dag. Tá hevði føroyski lønarskatturin komið niður á umleið sama støðið sum hjá sjófólki, og tá kundi sjómannafrádrátturin verið strikaður, uttan at sjófólkið fekk minni í lønarposan, enn tey fingu áðrenn. Kostnaðurin av at lækka skattin 6 % hevði verið knappar 400 mió kr. um árið, um tað ikki verður roknað við dynamiskum avleiðingum av umleggingini (øktum virksemi, økt nýtsla). Sannlíkt hevði nakað av peningi komið inn aftur til landskassan gjøgnum økt virksemi, men framvegis verður neyðugt at finna aðra fígging.

Ymiskir møguleikar eru at fíggja eina slíka umlegging. Ein møguleiki er at tálma almennu útreiðslurnar, so tær vaksa seinni enn inntøkurnar. Ein annar møguleiki er at seta í verk brúkaragjøld, hjá landi og/ella kommununum. Í dag hava kommunurnar útreiðslur av teimum borgarum, sum eru búsettir í kommununi, antin teir gjalda kommunuskatt ella ikki. T.d. hava kommunurnar útreiðslu av gjaldi til IRF, barnagarðar og aðrar kommunalar tænastur. Brúkaragjøld høvdu eisini haft tann fyrimun, at allir borgarar høvdu verið við til at fíggja part av hesum tænastum, eisini teir, sum arbeiða og rinda skatt aðrastaðni. Tó mugu brúkaragjøldini skipast so, at tey við lágari inntøku ikki verða ávirkað negativt av hesum broytingum.

### 2.2. Betra langtíðar haldførið

Føroyska skattatrýstið er rættiliga høgt, men hóast tað hava vit seinastu árini haft hall á Fíggjarlógini. Um tað skuldi eydnast at nýtt uppgangstíðirnar til at fáa javnvág á fíggjarlógini í komandi árum, eru tó eisini stórar avbjóðingar fyri framman. Tað, at vit gerast alsamt eldri, fer framyvir at leggja alsamt størri trýst á útreiðslurnar, serliga almanna- og heilsuútreiðslurnar.

Framskrivingar hjá Búskaparráðnum vísa, at um ikki tiltøk verða framd nú, kunnu inntøkur og útreiðslur landskassans ikki væntast at javnviga framyvir. Vantandi tiltøk á útreiðslusíðuni nú kunnu tí væntast at føra til ógvusligan niðurskurð í vælferðartænastum og/ella eitt enn størri skattatrýst, enn vit hava í løtuni. Báðar hesar avleiðingar bøta ikki um møguleikarnar at draga fólk og íløgur til landið í framtíðini.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur tað tí vera neyðugt, at vit beinanvegin seta í verk neyðug átøk fyri at tryggja langtíðar haldførið hjá landskassanum.

Búskaparráðið hevur í búskaparfrágreiðingini frá vári 2015[4] mett um langtíðar haldførið hjá landskassanum komandi árini. Búskaparráðið vísir serliga á demografisku broytingarnar í komandi árum, har vit gerast alsamt eldri, og har ein størri partur av fólkinum ikki eru á arbeiðsmarknaðinum.

Í 1987 var væntaði miðalaldurin hjá 65 ára gomlum 81 ár. Í 2012 var hetta tal hækkað til 85 ár, og í 2052 kann ein 65 ára gamal føroyingur vænta at gerast 88 ár. Hetta merkir, at væntaða livitíðin eftir pensiónsaldur hækkar frá 14 ár upp í 21 ár, um pensiónsaldurin ikki verður broyttur.

Hetta merkir so, at tað verða alsamt fleiri almennar útreiðslur, sum skulu fíggjast av teimum, sum eru virkin á arbeiðsmarknaðinum. Í 2005 vóru 4,2 fólk á arbeiðsmarknaðinum fyri hvønn pensionist. Í

2015 er hetta tað minkað til 3,5, og í 2045 verður mett, at tað í miðal eru 1,9 fólk fyri hvønn pensionist, verða ongar broytingar gjørdar. Samstundis fer tann stóri parturin av eldri fólkinum sannlíkt at leggja eitt størri trýst á útreiðslurnar til serliga almanna- og heilsuøkið, so sum sjúkrahúsverk, fólkapensión o.a.

Við øðrum orðum verður stórt trýst lagt á útreiðslurnar, meðan inntøkurnar standa í stað, tí tað ikki verða so nógv fleiri á arbeiðsmarknaðinum.

Niðurstøðan hjá ráðnum er, at um langtíðarjavnvág skal vera á fíggjarlógini, er neyðugt við einari varandi fíggjarpolitiskari herðing á 5% av BTÚ. Í tølum svarar hetta til uml. 750 mió kr. (5% av 15 mia. kr.). Við fíggjarpolitiska herðing meinast antin við sparingar á útreiðslusíðuni og/ella við øktar skattir og avgjøld.

Tað er vert at leggja til merkis, at ráðið í sínum framskrivingum ikki roknar við regulering av fólkapensiónini í mun til prís- og realvøkstur í samfelagnum annars, og at ein fortreyt um heilsugóða elding er løgd inn í myndilin. Í stuttum snýr heilsugóð elding seg um, at vit í framtíðini sannlíkt vera betri fyri sum eldri, enn fólk á samsvarandi aldri vóru fyrr. Tí kann ikki væntast, at ein 90 ára gamal persónur í 2030 í miðal hevur tørv á líka nógvum tænastum frá eitt nú heilsuverkinum, heimahjálp, os.fr., sum ein 90 ára gamal hevur í 2015.

At trupulleikin er veruligur, sæst við at hyggja eftir gongdini í eldratengdu útreiðslunum á Fíggjarlógini. Seinastu 10 árini eru eldraútreiðslurnar øktar við uml. 600 mió. kr., og sambært framskrivingunum fer útreiðsluvøksturin at halda fram, um tiltøk ikki verða sett í verk.

*Tiltøk at betra um langtíðar haldførið*

At fólk gerast eldri og harvið fáa størri tørv á heilsutænastum, verður torført at gera nakað serligt við. Fólk hava rætt til almennar heilsutænastur, um tey hava tørv á teimum. Um nakað skal gerast fyri at tálma tær aldurstengdu útreiðslurnar í komandi árum, er skilabetri at hyggja eftir pensiónunum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at hesi tiltøk eiga at verða framd beinanvegin fyri at minka um almennu útreiðslurnar, ið standast av einum hækkandi livialdri, og harvið tryggja langtíðar haldførið hjá landskassanum:

*1) Líðandi hækking av pensjónsaldri*

Størsta einstaka tiltakið fyri at tálma útreiðsluvøksturin hjá tí almenna í komandi árum er at hækka pensiónsaldurin. Hóast fólk gerast eldri og eldri, hevur pensiónsaldurin staðið í stað í nógv ár. Áramálið, tá fólk eru pensionistar, hækkar alsamt, um einki verður gjørt. Tað er tí neyðugt at taka avgerð um eina líðandi hækking av pensiónaldrinum, og tað eigur ikki at verða bíðað við hesum.

Ein møguleiki, sum hevur verið nevndur, er at lata pensiónsaldurin hækka við jøvnum millumbilum. T.d. ber til at lata pensiónsaldurin hækka við einum ári fimta hvørt ár í eitt áramál. Um hetta verður gjørt fyrstu ferð í 2018 og síðani fram til 2048, so verður langtíðar haldførið hjá landskassanum betrað so mikið nógv, at tað fer frá -5% av BTÚ til uml. -2,3% av BTÚ.

Aðrir møguleikar at hækka pensiónsaldurin finnast sjálvsagt eisini. Avgerandi er tó, at ein ætlan verður løgd, sum líðandi hækkar pensiónsaldurin so mikið nógv, at langtíðar haldførið verður

munandi betrað. Ein slík hækking má taka hædd fyri, at tað er ymiskt hvussu fólk eru fyri, tá tey eldast, og tí eigur møguleikin fyri fyritíðarpensión at verða varðveittur.

*2) Mótrokna arbeiðsinntøku í øllum almennum eftirlønum, men við einum lægri prosentparti*

Í verandi pensiónsskipan verður arbeiðsinntøka bert mótroknað í einum parti av almennu pensiónunum. Hon verður ikki mótroknað í stórum parti (uml. 70%) av almennu pensiónunum, sum landið rindar, herundir serliga grundupphæddini og samhaldsfasta. Hetta merkir, at ein pensiónistur, sum heldur fram at arbeiða eftir pensiónsaldur, í prinsippinum kann forvinna eina millión kr. um árið uttan at missa nakað í grundupphæddini ella samhaldsfasta.

Hinvegin er mótrokningarprosentið alt ov høgt í tí partinum av pensiónunum, har mótrokning verður framd. Um ein pensiónistur forvinnur eina krónu yvir 61.200 kr. um árið missur hann t.d. alla viðbótina til ávísar pensionistar. Harumframt er mótrokningarprosentið í vanligu viðbótini ógvuliga høgt (60%) umframt at skattur verður goldin av restini. Hetta merkir, at persónur vanliga missur omanfyri 70 % av samlaðu inntøkuni, um hann hevur inntøku omanfyri 61.200 kr um árið. Um persónurin eisini missur viðbótina til ávísar pensionistar, verður úrslitið uppaftur verri.

Hetta virkar tí sum ein effektiv arbeiðsforðing fyri pensiónistar, sum hava hug til og møguleika fyri at halda fram at arbeiða, tá teir náa eftirlønaraldur.

Tí heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag, at ein umlegging eigur at verða gjørd, har arbeiðsinntøka verður mótroknað í øllum pensiónum, men við einum nógv lægri prosentparti enn í dag. T.d. kundi ein skipan verið gjørd, har landið mótroknaði 25 % av arbeiðsintøkuni í øllum teimum almennu pensiónunum, sum landið veitir. Í hesum døminum hevði tað so merkt, at eingin almenn pensión varð goldin til persónar, sum forvinna meira enn uml. 500 tús. kr. í arbeiðsinntøku um árið.

Fyrimunurin fyri langtíðar haldførið hjá landskassanum er tvíbýtt. Um fólk fáa størri tilskundan til at halda áfram at arbeiða, sparir landskassin pensiónsútreiðslur, og harumframt rinda persónarnir skatt av arbeiðsinntøkuni.

*3) Seta í verk tiltøk fyri at betra um fólkaflytingina millum Føroyar og útheimin*

Ein partur av orsøkini til, at langtíðar fíggjarliga haldførið hjá landskassanum er so svikaligt er, at lutfallið millum fólk á arbeiðsmarknaðinum og fólk sum fáa eftirløn broytist til tað verra. Ein háttur at mótvirka hesum er um tað ber til at betra um fólkaflytingina.

Tí eiga kostnaðareffektiv tiltøk at vera sett í verk, sum kunnu vera viðvirkandi til at fáa fleiri fólk at flyta aftur til Føroya eftir lokna útbúgving. Arbeiðsbólkur undir landsstýrinum hevur gjørt eina heildarætlan fyri fólkaflyting og fólkavøkstur, við ítøkiligum tiltøkum, so tað er nú bara ein spurningur um vilja at fáa tey framd.

## Notur

[1] Sí t.d. OECD (2010), *Tax Policy Reform and Economic Growth*, OECD Tax Policy Studies, No. 20, OECD Publishing, Paris.

[2] Tá tað snýr seg um at draga fólk til Føroya at *búgva*, má tað umframt tað beinleiðis lønarskattatrýstið eisini takast hædd fyri onnur óbeinleiðis almenn avgjøld (t.d. MVG, punktgjøld og onnur nýtslugjøld). Men tá fólk so hava búsett seg í Føroyum, er tað serliga tað beinleiðis lønarskattatrýstið, sum ávirkar avgerðina um man velur at arbeiða og gjalda skatt í Føroyum ella í útlandinum.

[3] Fíggjarmálaráðið (2011), *Skattur á lønarinntøku í Føroyum í mun til onnur lond.* Notat til Fíggjarnevndina.

[4] Búskaparráðið (2015). *Búskaparfrágreiðing á Vári 2015.*